# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 21. februar 2024, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Eyðun Hansen, Laila Haldansen, Anja Haldansen og Ingi Olsen.
**Skrivari:** Rúna Ingunardóttir

Pauli T. Petersen møtti ikki á fundinum.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 259**
Eykajáttan til arbeiðir sum verða flutt til 2024.
Seyðahús hjá Fjalshaga (j. nr. 8201002-4-2020) og Fiskastykkið (j. nr. 509062-1-2020)

Vestmanna Bygdarráð viðgjørdi á fundi tann 25. januar 2024 mál um eykajáttan til at inniloka seyðahús til Fjalshaga afturfyri lendi til Fjalsveg og at gera parkeringspláss á fiskastykkinum í Toftabø.

Eykajáttanin varð einmælt samtykt við 1. viðgerð

**Viðv. 259**
Bygdarráðið samtyktið einmælt eykajáttanina við 2. viðgerð

**Mál 260**
Umraðfesting og eykajáttan til keyp av gravimaskinu
J.nr.: 8311002-1-2024

Vestmanna Bygdarráð viðgjørdi á fundi tann 25. januar 2024 mál um umraðfesting og eykajáttan til keyp av gravimaskinu.

Bygdarráðið setti kr. 390.000 av á fíggjarætlanini fyri 2024 til at langtíðarleiga eina gravimaskinu. Mett varð, at tað er betri við eini keypsavtalu. Samlaði kostnaðurin er kr. 1.025.000.

Mælt varð til at umraðfesta kr. 415.000 av rakstrinum hjá Maskinhøllini, til løgujáttan hjá Maskinhøllini.
Tað manglaði sostatt kr. 675.000 við eini eykajáttan.

Umraðfestingin og eykajáttanin varð einmælt samtykt við 1. viðgerð

**Viðv. 260**
Bygdarráðið samtyktið einmælt umraðfestingina og eykajáttanina við 2. viðgerð

**Mál 261**
Viðmerkingar til broytingar í byggisamtyktini
J.nr.: 102002-6-2023
Tvey broytingaruppskot komu inn, áðrenn kærufreistin var úti 31. januar 2024:

**1.** í samband við uppskot um víðkan av sethúsaøkinum á matr. nr. 189b hevur Jógvan Sigurd Hórðará broytingaruppskot um eisini at víðka sethúsaøkið á ogn hansara matr. nr. 296 og beinka linjuna yvir til sethúsaøkið á matr. nr. 45z soleiðis, at sethúsaøkið á matr. nr. 189b eisini verður víðkað nakað afturat tí, sum annars søkt er um. J. nr. 102002-2-2024

**2.** viðmerkingar og broytingaruppskot frá Jáhan i Niðristovu vegna Hanus i Niðristovu, festara i Heygahaga innara helvt, til ætlaðu varandi grótgoymsluna a Mýrunum i samband við uppskot um serstaka byggisamtykt fyri pumpuverkætlanina í Heygadali og á Mýrunum. 102002-1-2024
Festarin hevur saman við Búnaðarstovuni lagt uppskot fyri SEV um, hvussu alt tilfarið, sum kemur úr komandi tunnlinum á Mýrunum, kann gagnnýtast á ein burðardyggan hátt við at gera lendið klárt til meira framleiðslu av grønari orku.
Á skjølum, sum eru viðsend viðmerkingum/broytingaruppskotinum, sæst, at ætlanin er at seta vindmyllur upp, og at grótið skal brúkast til vegir, at binda myllurnar saman við, og til øki at seta myllumar á.

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 13. februar 2024 innkomnu broytingaruppskotini.

**Um 1:** Tekniska Nevnd mælir til at taka undir við ætlanini, men, um neyðugt verður við nýggjari almennari framløgu, fyrst at søkja um góðkenning av víðkanini av sethúsaøkinum á matr. nr. 189b, soleiðis sum upprunaliga søkt er um.

**Um 2**: Tekniska Nevnd mælir í fyrstu syftu til at senda verandi uppskot um serstaka byggisamtykt fyri pumpuverkætlan í Heygadali og á Mýrunum til góðkenningar. Um verkætlanin, sum er lýst í viðmerkingunum og broytingaruppskotinum frá festaranum, fær myndugleikagóðkenning, skal ein serstøk byggisamtykt gerast til hesa verkætlan. Í samband við eina almenna framløgu av hesi byggisamtykt, kundi eitt broytingaruppskot um at strika varandi grótgoymsluna á Mýrunum verið við í framløguni. Hetta skal fráboðast Byarskipanarnevndini og Umhvørvismálaráðnum, tá verandi uppskot um serstaka byggisamtykt fyri pumpuverkætlan i Heygadali og á Mýrunum verður sent til góðkenningar.

**Viðv. 261**
Tilmælini frá Teknisku Nevnd vóru einmælt samtykt.

**Mál 262**
Umsókn um at rinda ein part av kostnaðinum til at savna omanávatn frá litra "cd".
J.nr.: 600002-1-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 13. februar 2024 umsókn frá borgara, um kommunan vil rinda ein part av kostnaðinum at savna omanávatn, sum kemur frá kommunala vegnum litra "cd" – Fjalsvegur – oman á matr. nr. 291.

Tekniska Nevnd mælti til at ganga umsóknini á møti.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 14. februar 2024 tilmæli frá Teknisku Nevnd
Fíggjarnevndin mælti til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 262**
Bygdarráðið samtykti einmælt at rinda ein part (upp til kr. 15.000) av kostnaðinum at savna omanávatn frá litra "cd".

**Mál 263**
Umsókn um keyp av neystalendinum Bakkavegur 115
J. nr. 8202002-1-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 13. februar 2024 umsókn frá borgara um keyp av neystalendinum Bakkavegur 115.

Nevndin mælir til at matrikulera neystalendið, men at tað verður leigað umsøkjara eftir umsøkjaralista.

**Mál 263**
Tilmælið frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

**Mál 264**
Umsókn um byggiloyvi til seyðahús innanfyri Gleránna í Heygadali.
J.nr.: 230022-2-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 13. februar 2024 umsókn frá festara av Heygahaga innara helvt, um byggiloyvi til nýtt seyðahús innanfyri Gleránna í Heygadali.

Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti treytað av, at Yvirfriðingarnevndin góðkennir ætlanina.

**Viðv. 264**
Tilmælið frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur  tann 21. februar 2024, kl. 17.00

Varð viðgjørt fyri **afturlatnum hurðum**

**Mál 265**
Uppskot um makaskifti ímillum matr. nr. 94e á Skálheyggi við leiguøkið, undir bygninginginum á matr. nr. 249f á Heyganesi.
J.nr.: 8200002-1-2018

**Viðv. 265**
Bygdarráðið samtykti einmælt at fremja makaskifti, treytað av at kommunan hevur forkeypsrætt til undirlendið undir bygninginum, um ognin verður seld øðrum.

Bókin lisin.                                                    Fundur lokin kl. 19:00

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Bjørg á Rógvi | Sára Jógvansdóttir | Eyðun Hansen |
| Laila Haldansen | Anja Haldansen | Ingi Olsen |